## Grønland skerjir 5 prosent

Grønlendska landsstýrið kunnaði í gjárkvøldið danska veðurlagsmálaráðharran, Lykke Friis, um, at frá 2013 til 2020 fer Grønland at skerja sítt CO2-útlát fimm prosent samanborið við landsins útlát í 2007. Frammanundan hevur Grønland sett sær fyri at skerja útlátið átta prosent hetta til 2012 samanborið við útlátið í 1997. Grønlendingar ætla at røkka málinum við eitt nú at útbyggja vatnorkuna, bøta um bústaðarviðurskiftini og at avmarka orkunýtsluna í fiskivinnuni. Heimsnáttúrugrunnurin WWF er ikki hugtikin av grønlendsku ætlanini, men heldur fimm prosent vera alt ov lítið, skrivar DR.



## Taliban lovar mótstøðu

Taliban letur seg ikki ræða av boðunum frá Barack Obama, forseta um, at USA fer at senda 30.000 hermenn afturat til Afghanistan. Tvørturímóti lovar rørslan teimum amerikonsku hermonnunum enn harðari mótstøðu enn higartil, og at uppaftur fleiri amerikanarar fara at koma heim aftur í kistu. Taliban-talsmaðurin Qari Yousuf Ahamdi segði í gjár, at avgerðin hjá Obama at senda enn fleiri hermenn til Afghanistan styrkir stríðshugin hjá Taliban og fer tí eisini at elva til harðari mótstøðu.



*Tað er púra burturvið at koyra meiri laks í ringarnar. Tvørturímóti eiga myndugleikarnir at skerja alingina, siga Direktoratet for Naturforvaltning og Norsk Institutt for Naturforskning*

*Mynd: Sunnmørsposten*

# Neyðugt at skerja norsku alivinnuna

**Norsku myndugleikarnir hava gjørt av at loyva alistøðunum at koyra meiri laks í ringarnar næsta ár, samstundis sum fleiri nýggj aliloyvi eru latin. Tað er skeivt, siga serfrøðingarnir, sum mæla myndugleikunum til at skerja alivinnuna**

ALING

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tey, sum hava tilknýti til norsku laksaalingini, skulu í hesum døgum svara, hvat tey halda um eina ætlan hjá myndugleikunum at loyva alarum at økja laksatalið í verandi aliringum fimm prosent næsta ár. Í Direktoratet for Naturforvaltning (DN) er eingin ivi um, hvat svar Lisbeth Berg-Hansen, fiskimálaráðharri, skal fáa. Har mæla tey ráðharranum til at skerja laksatalið, áðrenn tað fer at vára aftur.

Tey standa ikki einsamøll. Í Norsk Institutt for Naturforskning (NINA) hava tey ta áskoðan, at norska alivinnan hevur langt síðani sprongt markið fyri, at vinnan kann vera burðardygg. Sagt verður, at í dag eru 350 milliónir alilaksar í ringum fram við norsku strondini, og soleiðis sum støðan er nú, merkir tað, at millum 300 og 350 milliónir kynsbúnar laksalýs eru í økinum.

Norsku myndugleikarnir hava latið 65 nýggj laksaaliloyvi í ár. Næsta ár verður einki nýtt loyvi latið, men harafturímóti er skotið upp at loyva alistøðunum at hava fimm prosenr fleiri laksar í hvørjum ringi. Hesin spurningurin er til hoyringar nú, og fleiri vast í, hvussu skilagott tað er at koyra meiri laks í ringarnar. Tey, sum ivast, vísa á, at tey fimm prosentini svara til 40 nýggj aliloyvi, og nú alingin hevur trupulleikar við laksalús, er tað ivasamt, hvussu skilagott tað er at koyra meiri laks í ringarnar, siga tey.

Torbjørn Forseth, ið arbeiðir sum granskari hjá NINA, er millum teirra, sum ivast. Hann sigur við tíðindastovuna NTB, at hugskotið at økja laksatalið er ikki sambæriligt við málið hjá myndugleikunum at varðveita laksastovnarnar.

### Eiga at kanna umhvørvið

Norunn S. Myklebust, sum er stjóri í NINA, sigur við NTB, at norðmenn eiga at steðga á og at kanna ávirkanina, sum laksalingin hevur á umhvørvið, og at loysa teir trupulleikarnar, áðrenn talan kann verða um at økja alingina.

NINA hevur svarað hoyringarskrivinum frá fiskimannaráðnum og mælir ráðnum til at taka uppskotið um fimm prosent øking aftur. Tað sama skrivar Direktoratet for Naturforvaltning í sínum svarskrivi og mælir harumframt tí politiska myndugleikanum til skerja talið á alistøðum fram við strondini. DN-stjórin, Janne Sollie, sigur, at tað er neyðugt at skerja alingina munandi og serliga í økinum millum Rogaland og Nordland.

Men Lisbeth Berg-Hansen, fiskimálaráðharri, fer neyvan at lurta eftir ráðunum frá DN og NINA. Hon sigur, at spurningurin um at skerja alingina hevur ikki verið og er ikki til viðgerðar. Sjálv heldur hon, at tann einstaki alarin hevur tann besta førleikan til at meta um, hvussu nógvan laks hann vil hava í ringunum. Ráðharrin sigur seg heldur ikki hava ætlanir um at steðga teimum 65 aliloyvunum, sum eru latin í ár, tí tað er ov seint. Hinvegin er hon sinnað at endurskoða uppskotið um at koyra meiri laks í ringarnar næsta ár, tá øll hoyringarsvarini eru komin.



*Lisbeth Berg-Hansen, fiski- og alimálaráðharri, vil ikki skerja alingina*

*Mynd: NRK*